

*Á umleið 2000 fermetrum í nýggjum bygningi í Søldarfirði eru umstøðurnar í framleiðsluni vorðnar nógv betri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Føroysk fyrstafloks lína og teymar úr Søldarfirði

**Teymavirkið hevur havt eina rímiliga stóra levering av teymum til Noregs, og ikki so fáir føroyskir línu-og útróðrarbátar, sum eru farnir til Grønlands at royna, havt keypt sær útgerð hjá føroyska framleiðaranum. Teymavirkið er nógv tann størsti framleiðarin, útbjóðarin og veitarin av línureiðskapi í Føroyum og selir soleiðis ein stóran part av útgerðini til føroysku línuskipini og útróðrarbátarnar**

Í nógv ár vóru Trol-og Snørisvirkið í Klaksvík og Teymavirkið í Runavík føroysku fyritøkurnar, sum framleiddu línur og teymar.

Í 2001 løgdu virkini saman og hava síðan tá bygt eina stóra framleiðsluhøll í Søldarfirði.

Viðsamanleggingini av virkseminum og við nýggju og rúmligu umstøðunum í Søldarfirði, kann felagið nú bjóða eina betri og skjótari tænastu, samstundis sum felagið í enn størri mun er ført fyri at raðfesta tørvir og krøv hjá viðskiftafólkum.

Og viðskiftafólkini hjá Teymavirkinum er í fyrsta lagi línu-og útróðrarflotin í Føroyum, men í ein ávísan mun eisini uttanlands, eitt nú í Noregi og Grønlandi.

Sosialurin var ein túr fram við í Søldarfirði mánadagin og hugdi at umstøðunum í nýggju framleiðsluhøllini, sum við gólvvíddini í neðra og á loftinum, sum partvís er innrættað, liggur um einar 2.000 fermetrar tilsamans.

Meðan vit enn stóðu í túninum, ringdu vit fyrst á telefonina hjá stjóranum, Rúna Berg, sum er sonur Ova Berg, sála, ið var maðurin, sum við ágrýtni slóðaði fyri og legði leistin longu, áðrenn Rúni kann minnast.

- Eg eri staddur í Danmark og eri á veg longur burtur. Tú ert vælkomin at fara innar og biðja Martin Johannesen vísa tær virksemið.

So mong vóru orðini í høvuðsheitum.

Vit avtalaðu at tosast við aftur, meðan hann enn bíðaði í floghavnini, men tá vit slerdu upp á tráðin einar tveir tímar seinni – og í hampiligari tíð áðrenn fráferð suðureftir, var einki samband.

### Seks fólk

Tá vit komu inn á gólvið, sást í fyrstani einki fólk, men maskinaríið koyrdi við fullari ferð. At síggja til, var ikki neyðugt við nógvum fólki í hesi framleiðslu.

Inni í stórum skápum mólu næstan eitt ótal av rullum, sum í síðsta enda vundu seg saman til línurygg, sum sjálvvirkandi vant seg upp á trumlur.

Vit fóru upp trappurnar og komu at enda fram á kaffistovuna.

Men áðrenn vit komu so langt, gingu vit uppi á loftinum aftur fram við ótali av rullum á maskinum, ið mólu tilfar saman, ið endar sum teymar og línuryggir í ymiskum tjúktum.

Fyrstu fólkini, vit sóu á virkinum hendan dagin, sóu vit í kaffistovuni. Her sótu fýra fólk og prátaðu aftur við onkrum etandi og einum temunni ella kaffimunni.

Tvey konufólk og tvey mannfólk.

- Vanliga eru vit eini seks fólk til arbeiðis á virkinum, men í dag eru vit bara fýra.

So skjótt kaffisteðgurin er av, kemur Martin Johannesen at vísa okkum virkið og framleiðsluna.

Martin er toftamaður, sonur Jóhan Johannesen, sum byrjaði á Teymavirkinum longu í 1978. Í endanum av hesum mánaðinum fyllir Jóhan sjeyti, men er framvegis aktivur í framleiðsluni.

- Pápi sigur, at hann verður verandi so leingi, hann orkar, sigur Martin, sum leggur aftrat, at hann við tíðini hevur yvirtikið ábyrgdarkendu uppgávurnar hjá pápanum, sum eru at fáa maskinaríini at koyra.

Og í so máta letur Martin væl at.

### Hugtikin av gomlum

- Maskinurnar koyra ógvuliga væl, og tað er sjáldan, at nakað gongur galið. Men sjálvsagt; tær skulu viðlíkahaldast og onkuntíð justerast.

Martin er maskinútbúgvin og hevur tí førleikan, sum kanska onkuntíð hevur vantað í framleiðsluni.

- Ovi var maskinmaður, men tað er sonurin, Rúni, ikki, leggur hann aftrat.

Martin, sum hevur verið á Teymavirkinum í 11 ár, er virkandi tekniskur leiðari á virkinum í Søldarfirði.

- Elstu maskinurnar, sum eru teymamaskinurnar á gólvhæddini, eru frá miðskeiðis í sjeytiárunum – og tann seinasta av trimum kom miðskeiðis í áttatiárunum. Jóan Pauli Fredriksen í Miðvági teknaði upprunaliga saman við Ova Berg hesar maskinur og framleiddi tær fyri Teymavirkið.

Tað skilst týðiliga á Martini, at hann er ógvuliga hugtikin av hesum gomlu maskinunum, sum enn í dag eru so góðar og vælkoyrandi, at tær næstan koyra av sær sjálvum.

- Hetta eru gamlar og sterkar maskinur, og stýringarnar eru gamlar, men tær virka, leggur hann aftrat.

Í løtuni verður tann eina av maskinunum umvæld.

- Á loftinum gera vit tóverkið til teymar og línuryggir, sum síðan verða settir saman og snúraðir við maskinunum á gólvhæddini

Martin sigur, at tey hava tríggjar maskinur, sum at enda festa svøvlarnar upp á línuryggin.

Tey fýra fólkini, sum vit hittu á kaffistovuni á Teymavirkinum,



*Martin Johannesen, tekniskur leiðari á Teymavirkinum í Søldarfirði, fylgir framleiðsluni, sum í stóran mun er sjálvvirkandi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

*Framhald á næstu síðu*